


IRF

# ÁRSFRÁSØGN 2020

Svanamerktur prentlutur 541-894

Myndir: Ólavur Frederiksen, Harriet Olafsdóttir og IRF

# Innihald


Upplýsingar um felagsskapin ..... 4
IRF fyriskipan ..... 5
Limakommunur og fólkatal ..... 6
Leiðslufrágreiðing ..... 7
Hendingar í árinum ..... 12
- Føroysk myndatekin til ruskíløt ..... 13
- Seinasta ballan brend ..... 13
- 249 ár í starvi hjá IRF ..... 14
- 25 ár í starvi hjá IRF ..... 14
- Dagur fyri kommunal bingju- og endurnýtslupláss ..... 15
- Korona og innsavningin ..... 15
- IRF sendir glas frá húsarhaldum til endurvinning ..... 16
- Høvdavirkið og IRF gjørt 10 ára fjarhitasáttmála ..... 17
- J&K Petersen vann útbjóðingina ..... 18
- Umhvørvispolitikkur við støði í heimsmálunum hjá ST ..... 19
- IRF við átaki at endurvinna matleivdir ..... 20
- IRF ment føroyska burturkasttrappu ..... 22
- Hvussu gagnnýtir tú tilfeingið, tá ið tú flettir? ..... 23

Hagtøl 2020 ..... 24
- Endurvinning ..... 26
- Pappír og papp ..... 26
- Plast ..... 26
- Elektronikkur ..... 27
- Jarn og metal ..... 27
- Serburturkast ..... 28
- Brenning ..... 28
- Tyrving ..... 30
- Oljureinsiverkið ..... 30
- Rottangatøming ..... 30

Høvuðstøl ..... 31
Talvur ..... 32
Gongdin í rakstrinum ..... 35
Rakstrarúrslit samanborð við fíggjarætlan ..... 36
Leiðsluátekning ..... 37
Váttan frá óheftum grannskoðara ..... 38
Nýttur roknskaparháttur ..... 40
- Rakstrarroknskapurin ..... 40
- Fíggjarstøða ..... 41

Rakstrarroknskapur ..... 42
Fíggjarstøða ..... 43
Rakstrarroknskapur býttur á økir ..... 44
Notur til roknskapin ..... 45
Gjaldførisfrágreiðing ..... 54
Rakstrarroknskapur fyri Oljureinsiverkið ..... 55
Rakstrarroknskapur fyri Reinsitænastuna ..... 56
Rakstrarroknskapur fyri Verkstaðið ..... 57
Rakstrarroknskapur fyri Serhøllin ..... 58
Rakstrarroknskapur fyri Endurvinnigarskipanina ..... 59




# UPPLÝSINGAR UM FELAGSSKAPIN

**Felagsskapurin**

L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF
Víkarvegur 107, 520 Leirvík
irf@irf.fo
www.irf.fo
Tlf: 41 42 43
V-tal: 353.477
Heimstaðarkommuna: Eysturkommuna
Starvsfólk: 82 ársverk

**Nevnd**

Kristina Roest, Suðuroy, forkvinna
Jonhard Joensen, Vágar, næstformaður
Artur Johansen, Eysturoy, nevndarlimur
Tummas Lervig, Norðoyggjar, nevndarlimur
Petra Iversen, Norðstreymoy, nevndarlimur
Bjarki Henriksen, Sandoy, nevndarlimur

**Stjórn**

Poul Andrias Joensen, stjóri

**Grannskoðan:**

**P/f JANUAR**
Óðinshædd 13
Postsmoga 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 47 00
januar@januar.fo
www.januar.fo

Ársroknskapurin fyri 2020 er góðkendur á ársaðalfundinum, tann ___________ 2021

_________________________________

Fundarstjóri

# IRF fyriskipan

**28 limakommunur**

**Aðalfundur**

**Nevnd**



**Kristina Roest**
Suðuroy, nevndarforkvinna



**Jonhard Joensen**
Vágar, næstformaður



**Artur Johansen**
Eysturoy, nevndarlimur



**Tummas Lervig**
Norðoyggjar, nevndarlimur



**Petra Iversen**
Norðstreymoy, nevndarlimur



**Bjarki Henriksen**
Sandoy, nevndarlimur

**Leiðsla**



**Poul Andrias Joensen**
Stjóri



**Jóhannus Danielsen**
Fíggjarleiðari



**Súsanna Berg**
Umhvørvisleiðari

**Deildarleiðarar**



**Andrias Joensen**
Brennistøð, Móttøkuhøll, Oljureinsiverk



**Adelbert Ellingsgaard**
Innsavning, Endurvinningarskipan, Reinsitænasta



**Torfinn Mortensen**
Innsavning í Suðuroy, Støðin í Trøllavík



**Petur Højgaard**
Verkstaður

# Limakommunur og fólkatal

| Limakommunur-økir | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | | |
| Fugloyar kommuna | 41 | 38 | 37 | 37 | 45 |
| Viðareiðis kommuna | 354 | 347 | 361 | 355 | 352 |
| Hvannasunds kommuna | 417 | 416 | 415 | 414 | 407 |
| Klaksvíkar kommuna | 5.347 | 5.250 | 5.194 | 5.110 | 5.012 |
| Kunoyar kommuna | 141 | 156 | 146 | 143 | 138 |
| **Tilsamans** | **6.300** | **6.207** | **6.153** | **6.059** | **5.954** |
| **Eysturoy** | | | | | |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.573 | 1.590 | 1.552 | 1.541 | 1.522 |
| Eysturkommuna | 2.214 | 2.156 | 2.119 | 2.084 | 2.060 |
| Nes kommuna | 1.400 | 1.338 | 1.326 | 1.279 | 1.258 |
| Runarvíkar kommuna | 4.220 | 4.165 | 4.047 | 3.945 | 3.917 |
| Sjóvar kommuna | 1.112 | 1.089 | 1.064 | 1.025 | 980 |
| Eiðis kommuna | 771 | 762 | 724 | 720 | 694 |
| **Tilsamans** | **11.290** | **11.100** | **10.832** | **10.594** | **10.431** |
| **Streymoy** | | | | | |
| Sunda kommuna | 1.814 | 1.811 | 1.796 | 1.749 | 1.706 |
| Kvívíkar kommuna | 627 | 597 | 592 | 596 | 601 |
| Vestmanna kommuna | 1.249 | 1.244 | 1.236 | 1.231 | 1.205 |
| **Tilsamans** | **3.690** | **3.652** | **3.624** | **3.576** | **3.512** |
| **Vágar** | | | | | |
| Vága kommuna | 2.140 | 2.130 | 2.086 | 2.056 | 2.026 |
| Sørvágskommuna | 1.220 | 1.237 | 1.202 | 1.176 | 1.128 |
| **Tilsamans** | **3.360** | **3.367** | **3.288** | **3.232** | **3.154** |
| **Sandoy** | | | | | |
| Sands kommuna | 538 | 533 | 521 | 520 | 530 |
| Skopunar kommuna | 456 | 440 | 461 | 465 | 453 |
| Skálavíkar kommuna | 145 | 144 | 139 | 142 | 145 |
| Húsavíkar kommuna | 111 | 115 | 110 | 112 | 117 |
| Skúvoyar kommuna | 43 | 40 | 42 | 42 | 42 |
| **Tilsamans** | **1.293** | **1.272** | **1.273** | **1.281** | **1.287** |
| **Suðuroy** | | | | | |
| Hvalbiar kommuna | 671 | 679 | 675 | 682 | 693 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.749 | 1.716 | 1.714 | 1.720 | 1.731 |
| Fámjins kommuna | 86 | 83 | 79 | 79 | 84 |
| Hovs kommuna | 97 | 99 | 101 | 98 | 103 |
| Porkeris kommuna | 319 | 318 | 319 | 313 | 296 |
| Vágs kommuna | 1.391 | 1.345 | 1.342 | 1.364 | 1.355 |
| Sumbiar kommuna | 350 | 358 | 363 | 358 | 351 |
| **Tilsamans** | **4.663** | **4.598** | **4.593** | **4.614** | **4.613** |
| **IRF TILSAMANS** | **30.596** | **30.196** | **29.763** | **29.356** | **28.951** |



# Leiðslufrágreiðing

**Inngangur**

2020 hevur á mangan hátt verið eitt sermerkt ár, ikki bert fyri IRF, men fyri allan heimin. Korona hevur havt stóra ávirkan á IRF og okkara virksemi.

Virksemið hjá IRF verður mett at hava so stóran samfelagsligan týdning, at tað ikki má steðga upp, og tí vórðu serligu koronatiltøkini sett í verk. IRF valdi at steingja allar deildir um miðjan mars fyri óviðkomandi fólki, og øll umsitingin arbeiddi heimanífrá í uml. 8 vikur. Hóast tað var ein nýggj, trupul og óvon støða hjá okkara starvsfólkum, eydnaðist hetta sera væl. Stórur dentur hevur verið lagdur á, at viðskiftafólkini hjá IRF einki skuldu merkja til, at virksemið hjá IRF var ávirkað av íkomnu koronustøðuni, og tað hevur higartil eydnast sera væl. IRF merkti einki til minkandi nøgdir av burturkasti í sambandi við koronustøðuna.

Gott 40 ár eru liðin, síðan IRF varð sett á stovn, og serliga tey fyrstu árini hjá felagnum leikaði mangan hart á. IRF telur í dag á leið 100 starvsfólk, og bæði nevnd og leiðsla eru errin um hesi starvsfólk, sum hvønn dag lyfta eina uppgávu av alstórum samfelagsligum og umhvørvisligum týdningi.

Eins og undanfarna ár er virksemið í 2020 merkt av nógvum byggivirksemi og spennandi verkætlanum hjá IRF.

Brennistøðin, sum var liðugt umvæld í 2018, hevur staðið seg ómetaliga væl. Vit eru farin frá at brenna 55 tons um samdøgrið til í miðal 75 tons um samdøgrið. Økta brenniorkan kemur væl við, tí nøgdirnar av burturkasti eru nógv vaksnar seinastu árini. Tó er burturkastnøgdin í 2020 minkað nakað í mun til 2019.

Móttøkuhøllin, sum varð roynd í undanfarna ári, var liðug fyrst í árinum. Rakstrarligu og umhvørvisligu fyrimunirnir við høllini eru nógvir, og hon er eitt stórt stig á grønu kós felagsins. IRF hevur nú møguleika at goyma timbur inni, og eisini verður alt tilfar kvarnað, áðrenn tað verður koyrt í køstin, sum ger, at tað er lætt at blanda tilfarið.

Í 2019 skrivaðu IRF og Tórshavnar kommuna undir sáttmála um at gera felags tyrvingar- og rottangapláss úti í Nýggjheiðum. Fyrsta byggistig, sum umfataði byggibúning v.m., var liðugt í 2020, og farið varð eisini undir 2. byggistig. Tá ið stórar íløgur verða gjørdar í felag heldur enn hvør sær, verður tað til gagns fyri allar føroyingar, tí kostnaðurin verður minni fyri hvønn borgara.

Tá ið útbyggingin av móttøkuhøllini byrjaði í 2017, misti umsitingin síni skrivstovuhølir á Hagaleiti. Umsitingin helt so til í leigaðum hølum í Klaksvík. Í 2020 hevur IRF fingið nýggjan umsitingarbygning á Hagaleiti.

Samanumtikið hevur 2020 verið eitt sera hendingaríkt ár, og nógv bendir á, at 2021 fer at vera eins spennandi.

### Búskaparliga gongdin

Ársúrslitið fyri 2020 er 730 tkr. í avlopi. Í rakstraræltanini er roknað við einum avlopi upp á 61 tkr. Sostatt er úrslitið 669 tkr. betri, enn roknað var við.

Inntøkurnar eru 6,4 mió. kr. hægri enn mett, annar uttanhýsis kostnaður er 3,7 mió. kr. hægri, og starvsfólkakostnaður er 1,7 mió. kr. hægri enn mett frammanundan. Avskrivingarnar blivu 813 tkr. hægri, og fíggjarkostnaðurin bleiv 458 tkr. lægri enn mett.

Í 2020 hevur IRF gjørt íløgur fyri tilsamans 61,5 mió. kr. Av hesum varð 3,1 mió. kr. nýtt á Hagaleiti til brennistøðina og móttøkuhøllina, 12,6 mió. kr. til umsitingarbygningin á Hagaleiti, 35,4 mió. kr. í tyrvingar- og umlastingarplássum, og 10,4 mió. kr. vórðu nýttar til bilar og maskinur.

Roknskapirnir fyri Oljureinsiverkið, Reinsitænastuna, verkstaðið, serhøllina og endurnýtsluskipanina eru við í høvuðsroknskapinum, men eru samstundis settir upp í egnum skjølum í ársfrágreiðingini.

Bruttoúrslitið fyri 2020 gjørdist 60,9 mió. kr., sum er 3,5 mió. kr. meira enn í 2019. Ársúrslitið gjørdist 730 tkr., sum er 1.145 tkr. minni enn í 2019.

Fíggjarstøðan javnvigar við 227 mió. kr. í 2020 í mun til 185 mió. kr. í 2019.

Gjaldførið við ársenda 2020 var 7,7 mió. kr.

Væntandi verður ársúrslitið fyri 2021 á sama støði sum í 2020.

### Burturkastnøgdirnar minkaðu í 2020, og ballugoymslan er tóm

Árini 2018 til 2019 vaks burturkastnøgdin, sum IRF tók ímóti, 20 %, úr 34.990 tonsum í 2017 upp í 41.996 tons í 2019. Í 2020 tók IRF ímóti 40.731 tonsum av burturkasti, ella 3% minni enn í 2019.

Brennistøðin á Hagaleiti brendi 25.945 tons av burturkasti í 2020, og hetta er ein minking upp á 3,3% samanborið við 2019, tá ið 26.843 tons vórðu brend. Havast skal í huga, at í sambandi við útbyggingina av brennistøðini í 2018 lógu 4.303 tons av burturkasti á goymslu við árslok 2018. Av hesum blivu 2.759 tons brend í 2019 og 1.544 brend í 2020. Burturkastið bleiv goymt í ballum, og beint fyri páskir í 2020 varð seinasta ballan brend.

### Raksturin av Oljureinsiverkinum rættaður upp aftur

Í 2019 hevði IRF trupulleikar við at sleppa av við alla ta reinsaðu oljuna í Føroyum, og tí varð neyðugt at senda av landinum. Hetta førdi við sær, at Oljureinsiverkið í 2019 hevði 1,4 mió. kr. í halli.

IRF hevur í 2020 endurnýggjað sáttmálan við Føroya Landsstýri um at savna inn, viðgera og selja spillolju. Sambært sáttmálanum rindar Føroya Landsstýri eina árliga stuðulsjáttan til IRF. Árliga stuðulsjáttanin, sum hevur verið 4 mió. kr., verður goldin IRF, tá ið grannskoðaða ársfrásøgnin fyri árið frammanundan er gjørd og móttikin.

Hevur Føroya Landsstýri árið fyri goldið meira enn tað, sum kravdist fyri virksemið, verður meirupphæddin at nýta til at gjalda lánsskuld niður við ella til neyðugar íløgur á Oljureinsiverkinum. Nýggjar samráðingar skulu vera um henda spurningin, um Oljureinsiverkið gevur munandi yvirskot í fleiri ár.

Grundað á hallið í 2019 og ivamálini, ið stungu seg upp í sambandi við samráðingarnar um nýggjan sáttmála við Føroya Landsstýri, samtykti nevndin hjá IRF í november 2019 at broyta prísskipanina, so at tey, sum lótu spillolju, tungolju og oljudálkað vatn til Oljureinsiverkið, rindaðu 1 kr./m$^3$. Hetta var tó ikki galdandi fyri limakommunurnar.

Eftir at nýggjur sáttmáli er gjørdur millum IRF og Føroya Landsstýri, er tað aftur ókeypis at lata spillolju og tungolju til IRF. Tó kostar tað 800 kr./m$^3$ at lata oljudálkað vatn til IRF, eins og útlendsk skip gjalda 800 kr./m$^3$ fyri spillolju, tungolju og oljudálkað vatn.

Í 2020 er øll reinsað olja, íalt 1.805 tons, seld í Føroyum, og raksturin av Oljureinsiverkinum í 2020 gav 2,1 mió. kr. í avlopi.

### Limakommunur og fólkatal

1. januar 2021 vóru vit 52.967 fólk í Føroyum, harav 30.596 búðu í limakommunum hjá IRF. Hetta eru 400 fólk fleiri enn við ársbyrjan 2020. Vit uppliva enn tilflyting í Føroyum, og IRF roknar við øktum fólkatali í langtíðarætlan felagsins.

### Limagjald

Limagjaldið hevur verið óbroytt síðstu árini. Eisini fyri 2021 verður limagjaldið óbroytt frá undanfarnum árum.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum broytir metingina av fíggjarstøðu felagsins.

## Rakstrarváðar

Seinnu árini hevur verið fólkavøkstur og viðgongd í búskapinum í Føroyum. Hetta hevur havt hækkandi inntøkur við sær hjá IRF. Um vend kemur í, og talan blívur um fólkaminking og afturgongd í búskapinum, kann væntast at inntøkan minkar. IRF fylgir væl við búskapargongdini, so tað eisini í framtíðini er samsvar millum inntøkur og útreiðslur hjá felagnum.

IRF hevur ikki týðandi upphæddir útistandandi hjá einkultum skuldara. Felagsins skuldarar halda sum heild væl sínar skyldur, men um afturgongd verður í búskapinum, kann tað føra við sær at gjaldsevnini hjá skuldarunum versna. Tað kann hava ávirkan á gjaldføri hjá felagnum. IRF fylgir væl við gongdini í útistandandi og hevur greiðar mannagongdir á skuldaraøkinum.

Renturnar á lánunum hjá felagnum eru bæði fastar og broytiligar. Vandi er við broytiligum rentum og felagið fylgir væl við gongdini á rentuni.

## Samfelagsábyrgd og menning

Samfelagsábyrgd er partur av øllum virkisætlanum hjá IRF. Felagið tillagar seg broyttum og herdum umhvørviskrøvum uttanífrá, t.d. í DK og EU í sambandi við lógarbroytingar av burturkastviðgerð, útláti og orkunýtslu. IRF hevur góðar førleikar á burturkast- og umhvørvisøkinum og vil ganga undan at menna starvsfólk felagsins, so tey eru útbúgvin og tilvitað um hesa samfelagsábyrgd, sum IRF átekur sær.

Broytt lógar- og samfelagskrøv, menning, tillagingar og broytingar á burturkast- og umhvørvisøkinum kunnu hava útreiðslur við sær, sum dýrka um rakstur felagsins.

## Íløgur og fígging

IRF hevur gjørt íløgur fyri 61,5 mió. kr. í 2020. Hetta er 11,0 mió. kr. minni enn upprunaliga ætlað. Orsøkirnar til minkaðu íløgurnar eru í høvuðsheitum, at íløgan úti í Nýggjheiðum er nakað seinkað, og at minni er brúkt til bilar og maskinur enn ætlað.

Nýggja móttøkuhøllin á Hagaleiti bleiv tikin í nýtslu í januar 2020 og umsitingarbygningurin í september 2020. Í ár verður arbeitt við at byggja saman millum brennistøðina og umsitingarbygningin. Tað arbeiðið er um at vera liðugt.

Í 2020 hevur IRF keypt tveir nýggjar rottangabilar.

IRF tók í 2019 eitt lán upp á 120 mió. kr. Lánið skal m.a. vera við til at fíggja byggingina úti í Nýggjheiðum. Í 2020 hevur IRF tikið eitt lán upp á 16,0 mió., sum fíggjar byggingina av umsitingarbygninginum á Hagaleiti.

## Rottanga- og tyrvingarpláss úti í Nýggjheiðum

Í desember 2019 varð sáttmálin millum IRF og Tórshavnar kommunu undirskrivaður um samstarvið um nýggja felags tyrvingarplássið og rottangaskipanina úti í Nýggjheiðum.

Upprunaliga var ætlanin at byggja fyri 106 mió. kr. og bíða við byggistigi 2.2., men í 2020 varð samtykt at halda fram við byggistigi 2.2. beinanvegin, so samlaði kostnaðurin fyri byggingina úti í Nýggjheiðum er mettur at vera 123 mió. kr.

J & K Petersen, sum hevur staðið fyri byggistigi 1, vann eisini útbjóðingina av byggistigi 2. Sáttmálin bleiv undirskrivaður í september 2020.

Tá ið fyrsta byggistig var liðugt í juni 2020, søkti IRF um loyvi at tyrva ilsku úti í Nýggjheiðum. Ilskan er ikki tongd at bygningum og fasilitetum annars, sum eru partur av 2. byggistigi. Umsóknin varð játtað, og IRF og KB hava koyrt ilsku til Nýggjheiðar síðan juli 2020. Ilskan verður nýtt til vegagerð á tyrvingarplássinum.

Verkætlanin verður gjørd yvir trý ár, og ymsu partarnir verða tiknir í nýtslu í stigum. Eftir ætlan verður alt arbeiðið liðugt í seinnu helvt av 2022.



## Nýggjur umsitingarbygningur á Hagaleiti

Í tíðarskeiðnum 2017–2020 hava leiðsla og umsiting hjá IRF hildið til í leigaðum hølum á Posthúsinum í Klaksvík, meðan arbeitt hevur verið við eini endaligari loysn til umsitingina.

Í februar 2020 bleiv endalig avgerð tikin um at byggja nýggjan bygning á Hagaleiti úr modulum, og flutt bleiv inn í bygningin longu í september 2020. Bygningurin er 710 fermetrar til støddar, í tveimum hæddum, íroknað eina samanbygging við brennistøðina. Kostnaðurin við samanbygging og innbúgvi er mettur til 16,0 mió. kr.

## Umhvørvispolitikkur felagsins dagførdur

Við støði í teimum 17 heimsmálunum hjá ST fyri burðardygga menning hevur IRF sett sær fýra høvuðsumhvørvismál. Umhvørvispolitikkurin útgreinar kós felagsins í arbeiðinum fram ímóti at gera Føroyar reinari og burðardyggari.

Tilverugrundarlagið hjá IRF er at savna og viðgera burturkast á umhvørvisliga rættan hátt, bæði fyri at fyribyrgja dálking av okkara umhvørvi og tryggja, at tilfeingið í burturkastinum verður hildið í ringrás.

IRF hevur valt at leggja høvuðsdentin á hesi fýra umhvørvismálini:

1. *Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla.* Øll nýtsla og framleiðsla hjá IRF skal vera ábyrgdarfull og burðardygg, og IRF skal eggja til fyribyrging, endurnýtslu og endurvinning av burturkasti í Føroyum.

2. *Reint havumhvørvi.* IRF skal virka fyri, at einki burturkast ella onnur skaðilig evni verða latin á sjógv.

3. *Grøn og skynsom orkunýtsla.* IRF skal hava eina grøna og skynsama orkunýtslu, og orkuframleiðslan hjá IRF skal gagnnýtast til fulnar.

4. *Eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum.* Hjá IRF skulu starvsfólk trívast og mennast. Eisini skal IRF vera ein virkin samstarvsfelagi á umhvørvisøkinum.

Við hesum umhvørvismálum skal IRF ganga á odda á burturkastøkinum og á nýskapandi og ágrýtnan hátt gera Føroyar grønari.

## Kanning av IRF sum arbeiðsplássi

Hjá IRF eru á leið 100 fólk í starvi. Starvsfólkini støðast væl hjá IRF, og í løtuni hava 11 starvsfólk verið í meiri enn 25 ár í starvi hjá IRF. Mál nr. 4 í umhvørvispolitikki felagsins er, at IRF skal vera eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum.

Í 2020 er ein kanning gjørd, sum kallaðist „IRF sum arbeiðspláss“. Kanningin fekk góða móttøku frá starvsfólkunum og hevði stóra svarluttøku. Kanningin staðfesti, at tað eru nøkur økir, sum bøtast kann um og arbeiðast eigur við. Fyri at taka sær av hesum er eitt HR-fólk sett í parttíðarstarv fyribils í eitt ár.

## Álandsvitjan

Í februar 2020 vóru nevnd og leiðsla hjá IRF í Álandi fyri at fáa íblástur til at menna føroyska burturkastøkið. Áland líkist Føroyum í støðd, og tískil hava tey nógvar av somu avbjóðingunum, sum vit, hvat viðvíkur smáplássum, frástøðum v.m. Túrurin var sera væleydnaður, og IRF fekk nógvan íblástur og ítøkilig amboð til at mennast á grønu kósini.

## Umsóknin frá Tórshavnar kommunu um at koma upp í IRF

17. apríl 2018 varð ynski frá Tórshavnar kommunu um innliman í IRF á fyrsta sinni tikið upp á nevndarfundi í IRF. Eftir drúgt kanningar- og fyrireikingararbeiði, nógvar nevndarfundir og aðrar fundir fóru nevnd og leiðsla á rundferð fyri at greiða limakommununum frá málinum, og hvussu innlimanin kundi fremjast. M.a. varð uppskot til avtalu lagt fram.

Ætlanin var so at leggja málið fyri aðalfundin í 2019, men Tórshavnar kommuna boðaði frá, at meiriluti ikki fekst fyri málinum í býráðnum. Eftir hetta samtykti Tórshavnar kommuna at seta ein serfrøðingabólk at kanna fyrimunir og vansar hjá Tórshavnar kommunu við at fara upp í IRF. Kanningin bleiv gjørd í 2020, men IRF hevur ikki fingið innlit í kanningina.

Fyrst í hesum árinum kunngjørdi nýggja samgongan í Tórshavnar Býráði, at Tórshavnar kommuna ikki fer upp í IRF, men ætlar at byggja sína egnu nýggju brennistøð. Hóast IRF hevur rykt, er eingin skrivlig fráboðan komin frá Tórshavnar kommunu, um teirra ynski frá 2018 stendur við ella ikki.

## Endi

Líkt er til, at vøksturin í burturkastnøgdunum er steðgaður, og við útbyggingunum seinastu árini og teimum útbyggingum, sum eru í gongd í løtuni, er IRF væl fyri at reka sítt virksemi komandi árini.

Føroyingurin verður meira og meira umhvørvistilvitaður og vil taka størri ábyrgd á seg. Dagliga vísa fólk umhvørvisligan vilja, men átøkini, sum kunnu gera munin, vanta enn. Uppgávan liggur hjá tí politiska myndugleikanum, hjá vinnuni, úti í privatu heimunum og hjá IRF.

Í 2020 minkaði nøgdin av burturkasti, sum fór til tyrving, 17%. Hetta er gleðiligt, og hjá IRF verður arbeitt víðari eftir hesum leisti í samsvari við umhvørvispolitikk felagsins, sum er dagførdur í 2020, at savna og viðgera burturkast á umhvørvisliga rættan hátt, bæði fyri at fyribyrgja dálking av okkara umhvørvi og tryggja, at tilfeingi í burturkastinum verður hildið í ringrás.

IRF hevur stóra ábyrgd at upplýsa vinnu og borgarar um burturkast og skiljing. Ætlanin er, at hetta økið í framtíðini í størri mun eisini skal snúgva seg um at fyribyrgja burturkasti. IRF skal leggja størri dent á at upplýsa um, hvussu framleiðsluhættir og nýtsluvanar eiga at gerast ábyrgdarfullari og umhvørvisvinarligari við tí endamáli at varðveita tilfeingið í ringrás og at minka um nøgdirnar av burturkasti.

Tilverugrundarlagið hjá IRF er at savna og viðgera burturkast á umhvørvisliga rættan hátt, bæði fyri at fyrbyrgja dálking av okkara umhvørvi og tryggja, at tilfeingið í burturkastinum verið hildið í ringrás.

Saman við limakommununum gongur IRF á odda at gera Føroyar grønari, okkara eftirkomarum til frama.



# HENDINGAR Í ÁRINUM






# **Føroysk myndatekin** til ruskíløt

Nú ber til at taka niður føroysk myndatekin til at seta á ruskíløt.

Talan er um myndatekinini frá Dansk Affaldsforening, sum IRF hevur umsett.

Myndatekinini kunnu takast ókeypis niður á heimasíðuni, og tey kunnu nýtast frítt í almennum og vinnuligum høpi.

Endamálið við felags myndateknum í øllum Norðurlondum er at gera tað lættari fyri borgarar og vinnu at skilja burturkast. Um øll brúka somu tekin, heiti og eyðkennislitir, verða færri ivamál og misskiljingar um, hvussu burturkastið skal skiljast, og tískil verður betri møguleiki at halda tilfeingi í ringrás.

# Seinasta **ballan** brend

Fyri páskir varð seinasta ballan hjá IRF í grótbrotinum úti á Vík í Leirvík brend.

Í 2018 varð Brennistøðin á Hagaleiti umvæld, og í tí sambandi lá hon still í fýra mánaðir. Í hesum tíðarskeiðinum varð alt brenniburturkastið ballað og lagt á goymslu í grótbrotinum úti á Vík. Tilsamans vórðu 10.230 ballur lagdar á goymslu, og beint fyri páskir varð seinasta ballan koyrd í køstin á Brennistøðini.

Tað hevur tikið longri tíð enn upprunaliga mett at brenna alt burturkastið á goymsluni, og hetta kemst m.a. av góðu gongdini í samfelagnum seinastu árini og metstóru nøgdunum av burturkasti.

Umvælingin av Brennistøðini hevur eydnast avbera væl, og við nýggju Móttøkuhøllini hjá IRF, sum varð tikin í nýtslu í januar, og við samstarvinum millum hesar báðar støðirnar er IRF farið frá at brenna 55 tons um samdøgrið til í miðal 75 tons um samdøgrið.






# 249 ár í starvi hjá IRF

Í februar mánað 2020 hevði IRF 9 starvsfólk, sum høvdu arbeitt hjá felagnum í meiri enn 25 ár.

Á myndini eru (f.v.) Poul Samuelsen, Súsanna Joensen, Marius Jacobsen, Jógvan Páll Johansen, Ólavur F. Johannessen, Jógvan Páll Danielsen, Jónsvein Lilaa, Heini Jón Johannesen og Poul Andrias Joensen.

Jónsvein Lilaa, Jógvan Páll Danielsen, Marius Jacobsen og Heini Jón Johannesen starvast allir á Brennistøðini úti á Hagaleiti. Ólavur F. Johannessen starvast sum innsavnari av virkisburturkasti, og Jógvan Páll Johansen arbeiðir við innsavning og viðgerð av serburturkasti. Súsanna Joensen starvast í fyrisitingini, og Poul Andrias Joensen er stjóri í IRF.

Í 2019 vóru 40 ár liðin, síðan IRF varð sett á stovn, og serliga tey fyrstu árini hjá felagnum leikaði tað mangan hart á. Eftir tógvið stríð fann Brennistøðin sítt pláss úti á Hagaleiti í Leirvík, og hon varð tikin í nýtslu í 1989 – fyri gott 30 árum síðani.

IRF telur í dag á leið 100 starvsfólk, og bæði nevnd og leiðsla eru errin um hesi starvsfólk, sum hvønn dag lyfta eina uppgávu av alstórum samfelagsligum og umhvørvisligum týdningi.



# 25 ár í starvi hjá IRF

29. januar 2020 var hátíðarhald fyri Poul Samuelsen og Jógvani Páll Johansen, ið báðir hava verið í starvi hjá IRF í 25 ár. Poul arbeiðir í Endurvinningarhøllini hjá IRF, har pappír, papp, PET-fløskur, metaldósir, bleytt vøruplast og stórsekkir verða hagreidd og avskipað til endurvinning uttanlands. Jógvan Páll arbeiðir við innsavning og hagreiðing av serliga dálkandi burturkasti.

Í sambandi við starvsdagarnar skipaði IRF fyri móttøku, har stjórin, Poul Andrias Joensen, ynskti Poul og Jógvani Páll til lukku, handaði blómur og gávubrøv og ynskti framhaldandi gott samstarv og blíðan byr.




# Dagur fyri **kommunal bingju- og endurnýtslupláss**

Í juni skipaði IRF fyri einum tiltaki, har vit savnaðu starvsfólk hjá limakommunum felagsins og hjá kommunalu bingju- og endurnýtsluplássunum kring landið.

Virksemið hjá IRF fevnir um allar Føroyar – frá norðasta horni til sunnasta spíssin, og tískil er tað ikki á hvørjum degi, at høvi býðst pørtunum at møtast.

Undirtøkan til tiltakið var sera góð, og næstan allar limakommunurnar vóru umboðaðar.

Á skránni var m.a. ein stutt gjøgnumgongd av virkseminum hjá IRF og framløga av nýggju plakatini hjá IRF, „Skiljing av byggiburturkasti". Harumframt greiddi IRF eisini frá nýggju bíleggingarappini, sum møguligt er hjá starvsfólkunum á kommunalu plássunum at taka niður á telefonina.

Høvi var hjá øllum luttakarum at fáa greiðu á ymiskum ivamálum um skiljing og annað, og síðan varð farið runt úti á Hagaleiti, har m.a. nýggja Móttøkuhøllin varð vitjað.

Tiltakið eydnaðist sera væl, og avgerð er tikin um, at ein tílíkur dagur verður á hvørjum ári.

# **Korona** og innsavningin

Innsavningin hjá IRF er ein samfelagsberandi tænasta, sum ikki má steðga upp. Í sambandi við koronusmittuna vórðu fyribyrgjandi tiltøk sett í verk í mars mánað fyri at tryggja, at innsavningin av burturkasti kundi halda fram so ótarnað sum gjørligt. M.a. vórðu borgarar mintir á at hugsa um reinførið og binda fyri allar burturkastposarnar. Á starvsfólkaøkinum vórðu eisini herdar mannagongdir settar í verk, soleiðis at møguliga smitta ikki skuldi raka innsavningina av burturkasti. Tiltøkini høvdu m.a. við sær, at tey, sum høvdu møguleika til tað, arbeiddu heima, og at starvsfólk hjá IRF annars ikki komu saman.

Korona ávirkaði tó ikki mongdirnar av burturkasti so nógv, og í 2020 tók IRF ímóti 40.731 tonsum av burturkasti, sum er 3% minni enn í 2019.





# IRF sendir **glas** frá húsarhaldum til **endurvinning**

Í summar fingu húsarhald møguleika at skilja glas frá til endurvinning. Seinastu árini hava nógv spurt eftir hesum skiljimøguleikanum, og tí er tað gleðiligt, at hetta nú kann lata seg gera. At glas, sum áður varð tyrvt, nú verður sent til endurvinning, er eitt stórt umhvørvisligt framstig fyri IRF.

Glasið, ið verður skilt frá húsarhaldsburturkastinum, kann latast inn á kommunala endurnýtsluplássið. Í alt hava 14 bingjupláss tikið av møguleikanum at skilja glas til endurvinning: í Vestmanna, Miðvági, Sørvági, Norðragøtu, Runavík, Hvannasundi, Haraldssundi, Vági, Fámjin, á Skála, Strondum, Toftum, Tvøroyri og í Klaksvík.

### Ein grønari hugburður

Føroyingar eru sum heild vorðnir alsamt meira umhvørvistilvitaðir, og bæði vinnan og borgarar spyrja eftir fleiri møguleikum at skilja burturkast.

Hugburðurin í føroysku kommununum er eisini nógv broyttur. Tá ið IRF bjóðaði út møguleika at fáa glasmóttøku á kommunalu plássini, vóru tað fleiri kommunur, sum alt fyri eitt meldaðu seg til nýggju skipanina.

### Hvat glas kann latast til endurvinning?

Allar glasfløskur, drekkigløs og glaskrukkur kunnu latast inn til endurvinning. Glasluturin skal vera tómur og skolaður við vatni (tað er ikki er neyðugt at vaska lutin við sápu). Áskriftir (etikettir) kunnu vera á glaslutinum, og tað sama er galdandi fyri lok og proppar úr plasti, tundri og metali.



# Høvdavirkið og IRF gjørt **10 ára fjarhitasáttmála**

Høvdavirkið (Faroe Marine Products) og IRF hava undirskrivað ein 10 ára fjarhitasáttmála.

Virkini, ið bæði liggja úti á Hagaleiti eystan fyri Leirvík, hava samstarvað í nógv ár. Við nýggja sáttmálanum er samstarvið um grønu orkuna tryggjað, og hetta gevur eitt gott grundarlag fyri virksemi hjá báðum pørtum.

### Frá burturkasti til grønan fjarhita

Avlopshitin frá brendum burturkasti verður roknaður sum grøn orka. Tá ið vit gagnnýta hendan hitan, fáa vit nyttu burtur úr brenniburturkastinum eina seinastu ferð, og harumframt minka vit um nýtsluna av øðrum orkukeldum. Í 2020 var orkuframleiðslan hjá IRF 73.596 MWh, og orkuframleiðslan er nógv økt síðan útbyggingina.

Fjarhitin verður nýttur innanhýsis hjá IRF at hita Brennistøðina, Endurvinningarhøllina, Oljureinsiverkið og Skrivstovubygningin við, og harumframt verður fjarhiti veittur Høvdavirkinum.

Í 2020 veitti IRF 16.389 MWh av fjarhita til Høvdavirkið, sum harumframt eisini nýtir reinsaða spillolju frá Oljureinsiverkinum hjá IRF.

### Eitt virki í stórari menning

Síðan Høvdavirkið varð stovnað í 2001, hevur hugsjónin verið at gagnnýta og virðisøkja størri partar av fiskarávørum til matna, heldur enn at hesir partar verða koyrdir burtur ella brúktir til djóraføði.

Á virkinum verða fiskahøvd og ryggir turkað og seld til Nigeria, og sigast kann, at tað gongur væl hjá virkinum. 60 fólk starvast á Høvdavirkinum í dag, og tey hagreiða 12.000 tons av rávørum árliga.

Nevndir og leiðslur hjá ávikavist Høvdavirkinum og IRF fegnast um, at 10 ára fjarhitasáttmálin er undirskrivaður, og síggja fram til nógv góð ár við gevandi samstarvi fyri báðar partar.



# **J&K Petersen** vann útbjóðingina

Í mai varð 2. byggistig av verkætlanini hjá IRF úti í Nýggjheiðum boðið út, og J&K Petersen vann útbjóðingina. Fyritøkan hevur eisini staðið fyri 1. byggistigi av verkætlanini, sum í høvuðsheitum fevndi um at gera økið byggiklárt.

2. byggistig skal vera liðugt í oktober 2022, og tá verður nýggja tyrvingar- og rottangaplássið hjá IRF sostatt klárt at taka í nýtslu.

Samlaða verkætlanin er mett at kosta 123 mió. kr.

### Um verkætlanina

Nýggja plássið verður úti í Nýggjheiðum í Kvívík. Staðsetingin er vald út frá tí góða og slætta lendinum, og so verður plássið eisini í hóskandi frástøðu frá bygdum øki. Nógv orka er løgd í at laga verkætlanina so væl til lendið sum gjørligt.

Úti í Nýggjheiðum verður verk til rottangaevju og høll til tyrviburturkast. Nýggja støðin verður stór og nýmótans samanborin við tey evju- og tyrvingarplássini, sum vit kenna til í dag. Tyrvingarplássið verður mett at kunna nøkta tørvin komandi 30 árini. Hetta skal sjálvandi takast við ávísum fyrivarni sæð í mun til samfelagsgongdina og menningina á endurnýtsluøkinum sum heild.

### Samstarv millum Tórshavnar kommunu og IRF

Verkætlanin úti í Nýggjheiðum er eitt samstarv millum IRF og Tórshavnar kommunu. Verkætlanin er ikki knýtt at eini samanlegging við Tórshavnar kommunu, men eins og á nógvum øðrum økjum í sambandi við burturkast- og endurvinning hevur tað víst seg, at samstarvið partanna millum hilnast væl og loysir seg hjá báðum pørtum.

# UMHVØRVIS POLITIKKUR

## við støði í heimsmálunum hjá ST



IRF hevur sett fýra høvuðsumhvørvismál við støði í teimum 17 heimsmálunum hjá ST fyri burðardygga menning. Umhvørvispolitikkurin útgreinar kós felagsins í arbeiðinum fram ímóti at gera Føroyar reinari og burðardyggari.

Tilverugrundarlagið hjá IRF er at savna og viðgera burturkast á umhvørvisliga rættan hátt, bæði fyri at fyribyrgja dálking av okkara umhvørvi og tryggja, at tilfeingið í burturkastinum verður hildið í ringrás.

### Fýra umhvørvismál vald út

IRF hevur valt at leggja høvuðsdentin á hesi fýra umhvørvismálini:

1. **Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla**
   Øll nýtsla og framleiðsla hjá IRF skal vera ábyrgdarfull og burðardygg, og IRF skal eggja til fyribyrging, endurnýtslu og endurvinning av burturkasti í Føroyum. Mál 1 byggir á heimsmál nr. 12 um ábyrgdarfulla nýtslu og framleiðslu.

2. **Reint havumhvørvi**
   IRF skal virka fyri, at einki burturkast ella onnur skaðilig evni verða latin á sjógv. Mál 2 byggir á tvey heimsmál: mál nr. 6 um reint vatn og reinføri, og mál nr. 14 um lív í havi.

3. **Grøn og skynsom orkunýtsla**
   IRF skal hava grøna og skynsama orkunýtslu, og orkuframleiðslan hjá IRF skal gagnnýtast til fulnar. Mál 3 byggir á heimsmál nr. 7 um burðardygga orku, og mál nr. 13 um veðurlagsátøk.

4. **Eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum**
   Hjá IRF skulu starvsfólk trívast og mennast. Eisini skal IRF vera ein virkin samstarvsfelagi á umhvørvisøkinum. Mál 4 byggir á heimsmál nr. 17, ið snýr seg um samstarv um heimsmálini.

Við hesum umhvørvismálum skal IRF ganga á odda á burturkastøkinum og á nýskapandi og ágrýtnan hátt gera Føroyar grønari.



# IRF við átaki at **endurvinna matleivdir**

Í summar sendi IRF øllum limakommununum eitt tilmæli um at bjóða borgarum sínum tær sokallaðu bokashi-spannirnar. IRF hevur sett í verk eina stuðulsskipan, har felagsskapurin rindar helvtina av øllum bokashi-settunum, sum limakommunurnar lata borgarum sínum.

Áhugin frá limakommunum vísti seg alt fyri eitt at vera stórur, og í 2020 vórðu yvir 700 bokashisett latin borgarum í 12 kommunum.

### Arbeitt verður við felagsloysn fyri endurvinning av matleivdum

IRF kannar møguleikarnar at gera eina felagsloysn fyri endurvinning av matleivdum í øllum økinum. Bæði møguleikarnir við ídnaðarkompostering og biogass-framleiðslu verða kannaðir.

IRF fylgir neyvt við, hvussu onnur lond við somu fortreytum sum Føroyar gera, og vit vóna, at vit skjótt kunnu koma við einum útspæli um, hvussu ein felags loysn fyri alt IRF-økið kann fara at síggja út.

Meðan vit bíða eftir felagsloysnini, vil IRF stuðla teimum kommununum, ið eru ídnar eftir at sleppa í gongd við endurvinning av matleivdum. Hetta verður gjørt við eini stuðulsskipan til bokashi, har IRF rindar 50% av øllum bokashi-settum, sum verða latin borgarum.

### Bokashi framløgur fyri borgarum

Í sambandi við bokashi verkætlanina hevði Súsanna Berg, umhvørvisleiðari hjá IRF, framløgu úti hjá fleiri kommunum um, hvussu húsarhald kunnu endurvinna matleivdir við bokashi. Góð uppmøting var til framløgurnar, og tað var sera áhugavert at hoyra frá borgarum um teirra royndir og eygleiðingar við bokashi.




# UM BOKASHI

Við bokashi-tilgongdini ber til at hagreiða matleivdir í køkinum uttan at brúka posar og uttan at tøma spannina hvønn dag. Gerin, ið fylgir við settinum, inniheldur virknar smáverur (mikroorganismur), sum seta gongd á eina súrnan av matleivdunum. Gerin forðar fyri roti og tí eisini ringum lukti. Súrnan er eitt natúrligt stig, tá ið lívrunnið burturkast verður brotið niður. Áðurnevndu smáverur (mikroorgamismur) seta ferð á súrnanina, og tær forða eisini fyri, at spannin við matleivdum fer at lukta rotin.

Úrslitið av bokashi-tilgongdini er fyrsta floks sankutøð/bokashi.



Súsanna Berg, umhvørvisleiðari hjá IRF, hevur framløgu.

# IRF ment føroyska **burturkasttrappu**

Í summar gjørdi IRF eina føroyska burturkasttrappu við íblástri frá líknandi trappum úr Svøríki og Danmark. Eitt nú er burturkastfyriskipanin hjá ES grundað á hugsjónina aftan fyri burturkasttrappuna.

Burturkasttrappan vísir okkum, hvussu vit skulu handfara burturkast fyri at verja umhvørvið og fyri at leingja um livitíðina á virðismiklum tilfeingi og soleiðis halda tilfeinginum í ringrás.

Ætlanin við burturkasttrappuni er m.a. at brúka hana sum undirvísingartilfar til skúlar, barnagarðar o.s.fr.

## Trappa við fimm trinum

Burturkasttrappan hevur fimm trin: 1. Fyribyrging, 2. Endurnýtsla, 3. Endurvinning, 4. Orkuútvinning og 5. Tyrving. Tess longur upp tú kemur á trappuni, tess betri er tað fyri umhvørvið.




**Trin 1: Fyribyrging**

Tað allarbesta fyri umhvørvið er at fyribyrgja, at burturkast verður framleitt. Hetta gert tú við at vera tilvitað/ur um nýtsluvanar og innkeyp. Tú kanst t.d. velja at keypa góðskuvørur við longri livitíð heldur enn einnýtisvørur. Tú kanst keypa frá fyritøkum, ið hava eina skynsama og burðardygga framleiðslu, har spill í minst møguligan mun kemur fyri. Týdningarmest er tó at hugsa um bert at keypa tað, sum tú veruliga hevur brúk fyri, og í mest møguligan mun at nýta tað, sum tú hevur, ella møguliga læna frá øðrum.

**Trin 2: Endurnýtsla**

Tú kanst gleða onnur við at lata innbúgv, klæðir, byggitilfar v.m., sum tú ikki longur brúkar, til onnur at endurnýta. Endurnýtsla kann eisini vera, at lutir fáa eina nýggja funktión heima hjá tær sjálvum – t.d. tá ið plattarammur verða til blómukassar. Endurnýtsla sparir bæði tær og umhvørvinum tíð, tilfar, orku og pengar.

**Trin 3: Endurvinning**

Tá ið vit endurvinna burturkast, nýta vit tilfarið í burturkastinum til at gera nýggjar vørur. Eitt dømi um hetta er, tá ið trol verður endurvunnið og gjørt til nýggjar plastvørur. Tá verður tilfarið í burturkastinum nýtt umaftur, og á henda hátt verður tilfeingið hildið í ringrás.

**Trin 4: Orkuútvinning (Brenning)**

Tá ið burturkast verður brent, ber til at gagnnýta hitan frá brenningini til fjarhita. Tískil er betri at brenna burturkast enn at tyrva tað. Vit kunnu tó bert brenna burturkastið eina ferð, og tískil verður tilfeingið í burturkastinum ikki hildið í ringrás, tá ið vit brenna tað.

**Trin 5: Tyrving**

Niðasta trin á trappuni er tyrving, og hetta er, tá ið burturkastið verður grivið niður. Tá ið vit tyrva burturkast, fáa vit ikki gagnnýtt tilfeingið í burturkastinum. IRF arbeiðir tí við at flyta burturkastbólkar, sum í dag verða tyrvdir, upp eftir trappuni, soleiðis at tilfeingið í burturkastinum í størri mun kann haldast í ringrás.



# Hvussu **gagnnýtir** tú tilfeingið, tá ið tú flettir?

Um heystið, tá ið flettingin stendur fyri framman, vísir IRF á týdningin at burturbeina leivdirnar á rætta hátt. Hesa ferð varð eisini víst á møguleikarnar at gagnnýta tað tilfeingið, sum fæst burtur úr seyðinum.

Til ber at garva skinn, evna prýðislutir úr horni, gera sápu og ljós úr tálg, borðreiða við eini ørgrynnu av spennandi og øðrvísi máltíðum og mangt annað. Einans hugflogið setur markið.

Kvøldskúlar bjóða eisini skeið í t.d. hornarbeiði, fleiri kommunur eru farnar at gera ljós úr tálg at brenna á nýggjárinum, og nakrar matstovur gera nógv burtur úr føroyska tilfeinginum á matseðlinum.

Hetta gleðast vit um, tí á henda hátt brúka vit í nógv størri mun alt tað tilfeingið, sum kemur burtur úr flettingini, og samstundis minka vit um nøgdirnar av lívrunnum burturkasti at brenna.



# HAGTØL 2020



Hjá IRF verður burturkast viðgjørt eftir trimum høvuðsháttum: Endurvinning, orkuútvinning (brenning) og tyrving. Endurvinningarburturkast er tilfeingi, ið kann verða til nýggjar vørur, t.d. papp. Burturkast, ið ikki kann endurvinnast, t.d. húsarhaldsrusk, verður brent, og hitin verður nýttur til fjarhita. Tilfar, ið hvørki kann endurvinnast ella brennast, t.d. gips, verður tyrvt. IRF arbeiðir fram ímóti, at so nógv burturkast sum gjørligt verður endurvunnið, í aðru atløgu brent og í síðsta enda tyrvt.

Í 2020 tók IRF ímóti 40.731 tonsum av burturkasti (Talva 1). Ritmynd 1 vísir býtið millum burturkastbólkarnar. IRF brendi 60,5% av burturkastinum í 2020, endurvann 28,9% og tyrvdi 10,6%.

**Talva 1** – Burturkastnøgdir, sum IRF tók ímóti í 2018–2020. Fyri at kunna samanbera hagtøl eru nøkur tøl umroknað frá $m^3$ til tons.

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Endurvinning, tons | 11.777 | 12.209* | 11.926 |
| Orkuútvinning (brenning), tons | 24.648 | 24.589 | 21.773** |
| Tyrving, tons | 4.305 | 5.198 | 5.210 |
| **Tilsamans, tons** | **40.731** | **41.996** | **38.909** |

* Í hagtølunum frá 2019 stóð 12.135 tons til endurvinning. Rætta talið er 12.209 tons.
** Í hagtølunum frá 2018 stóð 23.137 tons til brenning. Rætta talið er 21.773 tons.

**Ritmynd 1** – Býtið millum bólkar 2020




Talva 2 vísir vøkstur og minking í burturkastmongdum seinastu trý árini. Í 2020 var ein steðgur í vaksandi burturkastmongdunum frá 2019 og 2018, og burturkastnøgdirnar minkaðu 3,0% samanborið við 2019. Burturkast at orkuútvinna (brenna) stendur mestsum í stað. Nøgdin til endurvinning er minkað 3,5%. Samlaða mongdin til endurvinning er minkað, tí í 2020 var bert ein avskiping av jarni vegna lágar prísir. Eisini er mongdin av spillolju og reinsaðum vatni nakað minkað. Nøgdirnar av burturkasti til tyrving eru minkaðar 17,2%. IRF hevur í 2020 sett átøk í verk at minka um mongdina av burturkasti at tyrva. Fleiri bólkar eru fluttir frá tyrving til brenning og endurvinning. Eisini hjálpir Móttøkuhøllin til at fyribyrgja, at timbur má tyrvast.

**Talva 2** – Vøkstur og minking í burturkastnøgdum 2018–2020

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Endurvinning, % | -3,5% | 2,4% | 8,1% |
| Orkuútvinning (brenning), % | 0,2% | 12,9% | 3,8% |
| Tyrving, % | -17,2% | -0,2% | 74,6% |
| **Tilsamans, %** | **-3,0%** | **7,9%** | **11,2%** |

## Endurvinning

IRF sendir fleiri burturkastbólkar av landinum til endurvinning. Í 2020 fór IRF undir at savna glas, sum áður varð tyrvt, til endurvinning. Tó eru innkomnu nøgdirnar í 2020 so smáar, at enn er einki glas sent av landinum, og tí verða tøl fyri glas ikki sjónlig fyrr enn í 2021. IRF er eisini farið at senda allar ljósperur og spreydósir til endurvinning. Hesir bólkar vórðu partvíst brendir fyrr. Talva 3 vísir yvirskipaðu burturkastbólkarnar, ið verða sendir til endurvinning. Hvør bólkur sær er útgreinaður í talvunum 4–8.

**Talva 3** – Burturkastnøgdir til endurvinning 2018–2020 (tons)

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Papp og pappír | 2.464 | 1.992 | 2.062 |
| Plast | 867 | 844* | 629 |
| Jarn og metal | 2.233 | 2.902 | 3.059 |
| Elektronikkur og káplar | 191 | 157 | 173 |
| Plantuolja | 10 | 5 | - |
| Serburturkast | 151 | 115 | 155 |
| Spillolja | 1.805 | 2.023 | 2.138 |
| Reinsað vatn | 4.056 | 4.172 | 3.711 |
| **Tilsamans** | **11.777** | **12.209** | **11.926** |

* Í hagtølunum frá 2019 stóð 771 tons av plasti. Rætta talið er 844 tons.

## Pappír og papp

Endurvinningarhøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr øllum landinum. Í 2020 var samlaði útflutningurin 2.464 tons, og hetta er 24% hækking samanborið við 2019 (Talva 4). Verður hugt at býtinum millum papp og pappír, sæst, at tað er serliga nøgdin av pappi, ið økist, men mongdin av pappíri er eisini økt nakað.

**Talva 4** – Mongdir av pappi og pappíri til endurvinning 2018-2020 (tons)

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Pappír | 529 | 484 | 612 |
| Papp | 1.935 | 1.507 | 1.450 |
| **Tilsamans** | **2.464** | **1.992** | **2.062** |

## Plast

IRF mennist støðugt, tá ið tað snýr seg um plastendurvinning, og í 2020 vórðu 867 tons av plasti send til endurvinning (Talva 5). Størstu plastbólkarnir í 2020 eru trol og net við 278 tonsum og stórsekkir við 277 tonsum. Báðir bólkar seta met í 2020 við størstu árliga mongd higartil. Mongdin av aliringum og fóðurslangum er minkað nakað, mongdin av einnýtisfløskum úr PET-plasti, t.d. sodavatnsfløskur, liggur støðugt um 100 tons árliga. Bleytt vøruplast er hækkað frá 58 tonsum í 2019 til 73 tons í 2020. Ein orsøk er, at IRF nú eisini sendir litað vøruplast og vøruplast við prenti til endurvinning.

**Talva 5** – Mongdir av plasti til endurvinning 2018-2020 (tons)

| **Plast** | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Trol og net | 278 | 245 | 141 |
| Stórsekkir | 277 | 270 | 217 |
| Aliringar og fóðurslangur | 140 | 166 | 106 |
| Einnýtisfløskur PET | 94 | 96 | 107 |
| Bleytt vøruplast | 73 | 58 | 55 |
| Annað hart plast | 5 | 8 | 3 |
| **Tilsamans** | **867** | **844** | **629** |

## Elektronikkur

Í 2020 útflutti IRF 191 tons av káplum og elektronikki til endurvinning. Av hesum vóru 138 tons elektronikkur og 53 tons káplar (Talva 6). Tað er sera týdningarmikið fyri IRF, at elektronikkur og káplar, sum innihalda nógv metal, fara til endurvinning og ikki verða brend, tí talan er um virðismikið tilfeingi, sum kann endurvinnast umaftur og umaftur.

**Talva 6** – Mongdir av elektronikki og káplum til endurvinning 2018–2020 (tons)

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Elektronikkur | 138 | 118 | 114 |
| Káplar | 53 | 39 | 59 |
| **Tilsamans** | **191** | **157** | **173** |

## Jarn og metal

Í 2020 sendi IRF 2.233 tons av jarni og metalum til endurvinning (Talva 7). Hesin burturkastbólkur verður smeltaður um til nýggjar lutir ella nýtt tilfeingi og kann endurvinnast nógvar ferðir. Størsti bólkurin í 2020 er, eins og undanfarin ár, blandað jarn við 1.436 tonsum. Orsøkin til, at hesin bólkur er minkaður, er at bert ein avskiping er gjørd í 2020, tí IRF gjørdi av at bíða við seinnu avskiping til januar 2021, tá ið betri prísur fæst. Í 2020 vórðu eisini 27 tons av einnýtis metalíløtum og 60 tons av øðrum metalum, so sum kopar, aluminium og rustfrítt stál, send til endurvinning.

Í 2020 tók IRF ímóti 592 bilvrakum, og hetta er ein hækking samanborið við árið fyri. Øll bilvrak, sum IRF tekur ímóti, verða send til Kommunalu Brennistøðina á Hjalla til umhvørvisviðgerð, áðrenn tey verða send av landinum sum gamalt jarn.

**Talva 7** – Jarn og metal til endurvinning 2018-2020 (tons). Miðalvektin á bilvrakum í hagtølunum er ásett at vera 1,2 tons.

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Jarn | 1.436 | 2.131 | 2.251 |
| Einnýtis metalíløt | 27 | 29 | 34 |
| Bilvrak | 710 | 684 | 721 |
| Annað metal | 60 | 58 | 53 |
| **Tilsamans** | **2.233** | **2.902** | **3.059** |



## Serburturkast

Nakrir burturkastbólkar, ið IRF tekur ímóti, verða sendir til serviðgerð uttanlands, tí teir innihalda evni, ið eru dálkandi, t.d. er kyksilvurið í eldri spariperum sera dálkandi fyri umhvørvið. Samanlagt sendi IRF 205 tons av burturkasti til serviðgerð í 2020 (Talva 8).

IRF sendi 2,8 tons av kemikalium og 50 tons av evju frá nótavaski til brenning uttanlands í 2020. Kemikalii og evja frá nótavaski verða brend á brennistøðum uttanlands, sum eru góðkendar til júst hetta. Orsøkin til, at nótaevjan ikki kann brennast á Hagaleiti, er mongdin av kopari í evjuni. IRF letur fýrverk til Arktisk Kommando, ið burturbeinir hetta á tryggan hátt. Í 2020 vórðu 700 kg av fýrverki burturbeind.

Ein partur av serburturkastinum, sum verður sent uttanlands, verður endurvunnin. Tá er mannagongdin, at dálkandi evni fyrst verða burturbeind á tryggan hátt, og síðan verða metal og glas endurvunnin. Í 2020 vórðu m.a. 71 tons av køli- og frystiskápum, 64 tons av akkumulatorum og 8,2 tons av battaríum send til endurvinning.

IRF sendir nú allar ljósperur til endurvinning uttanlands, áður varð partur av hesum brendur. Í 2020 vóru 2,5 tons av ljósperum send til endurvinning. IRF sendir eisini allar spreydósir til endurvinning. Í 2020 vóru 2,0 tons av spreydósum send til endurvinning.

**Talva 8** – Mongdir av serburturkasti 2018–2020 (tons)
Alt uttan evja frá nótavaski, kemikaliiburturkasti og fýrverk fer til endurvinning

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Evja frá nótavaski | 50 | 46 | 97 |
| Kemikaliiburturkast | 2,8 | 13,8 | 4,0 |
| Fýrverk | 0,7 | 0,4 | 0,4 |
| Trýstfløskur | 3,9 | 2,5 | 7,0 |
| Spreydósir | 2,0 | | |
| Ljósperur og ljósrør | 2,5 | 2,5 | 3,0 |
| Battarí | 8,2 | 7,1 | 8,6 |
| Akkumulatorar | 64 | 42 | 72* |
| Køli- og frystiskáp | 71 | 61 | 64 |
| **Tilsamans** | **205** | **175** | **256** |

* Í hagtølunum 2018 stóð 80 tons. Rætta talið er 72 tons.

## Brenning

Í 2020 tók IRF ímóti 24.648 tonsum av burturkasti at brenna, harafturat brendi IRF írestandi 1.544 tons av burturkasti, sum lá á goymslu við ársbyrjan 2020. Hetta er burturkastið, ið varð lagt á goymslu, meðan Brennistøðin varð útbygd.

Í 2020 vórðu 25.945 tons av burturkasti brend á Hagaleiti. Árið fyri vórðu 26.843 tons brend (Talva 9). Harafturat vórðu eisini 134 tons av burturkasti brend á Kommunalu Brennistøðini á Hjalla í 2020, sum er minsta árliga mongd seinastu seks árini. IRF brendi 113 tons uttanlands. Hetta er ser- og endurvinningarburturkast, sum ikki kundi endurvinnast og tískil er brent.

**Talva 9** – Burturkast til brenning 2018-2020 (tons)

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Burturkast á goymslu við ársbyrjan | -1.544 | -4.303 | -1.465 |
| Burturkast brent á Hagaleiti | 25.945 | 26.843 | 18.394 |
| Burturkast brent á Hjalla | 134 | 445 | 440 |
| Endurvinningarburturkast at brenna | 60 | | |
| Evja frá nótavaski | 50 | 46 | 97 |
| Kemikaliiburturkast | 2,8 | 14 | 4 |
| Burturkast á goymslu við árslok | - | 1.544 | 4.303 |
| **Móttikið burturkast at brenna í alt** | **24.648** | **24.589** | **21.773** |

Brennistøðin var í rakstri 8.347 tímar í 2020. Hetta svarar til, at ovnurin einans hevur ligið stillur í 18 dagar (Talva 10). Tað er sera lítið og er eitt úrslit av væleydnaðu útbyggingini. Ovnurin brennir í miðal 3,1 tons um tíman, sum svarar til 75 tons um samdøgrið.

**Talva 10** – Rakstrarhagtøl Brennistøðin 2018–2020 (tons)

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Brennitímar, tímar | 8.347 | 8.502 | 6.267 |
| Dagar, ið brennistøðin lá still | 18 | 11 | 104 |
| Brent hjá IRF, tons/tíma | 3,1 | 3,2 | 2,9 |
| Brent hjá IRF, tons/dag | 75 | 76 | 70 |

Orkuframleiðslan hjá Brennistøðini var 73.596 MWh í 2020, og av hesum vóru 16.389 MWh veitt sum fjarhiti til Høvdavirkið og IRF á Hagaleiti (Talva 11). Hetta svarar til, at nýtslustigið av fjarhitanum er 22%, og tað er ein minking samanborið við 2019. Orsøkin er, at Høvdavirkið hevur tvífaldað nýtsluna av reinsaðari olju og tí ikki hevur havt tørv á eins nógvum fjarhita.

**Talva 11** – Orkuframleiðsla og fjarhitanýtsla Brennistøðin 2018–2020 (MWh)

| | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Orkuframleiðsla | 73.596 | 69.513 | 38.900 |
| Veittur fjarhiti | 16.389 | 19.849 | 4.133 |
| Veittur fjarhiti, % | 22% | 29% | 11% |

Í 2020 vórðu samanlagt 3.563 tons av ilsku frá Brennistøðini tyrvd á umhvørvisgóðkendum tyrvingarplássum (talva 12). Ilska er botnøskan úr ovninum, ella, sagt við øðrum orðum, tað, sum er eftir, tá ið burturkastið er brent. Mongdin av ilsku er vaksin síðan umbyggingina í 2018, tí nú verður meira brent.

